alt sum brotna kundi var í sori. Frakland var nú skjótt hersett av týskinum, so hagar var ikki farið aftur.

## Olaf í japanskum fangaskapi

Olaf fór so at sigla við stórum farmaskipum tvørtur um atlantshav. Hvønn túr høvdu teir 500 tons av roykfríum krúti umborð.

Tann 12. apríl 1942 fóru teir úr Suðurafrika til Urugay, og á leiðini vórðu teir søktir av einum týskum skipi. Helvtin av manningi, sum var 55 doyðu, tá ið skipið sakk, meðan hinir krøktu seg í alt flótandi, og teir vórðu tiknir umborð á týska skipið. Olaf var ein av teimum.

Teir vóru tiknir fyrst til Singapore og síðan til Japan. Har vóru teir í japanskum fangaskapi í fleiri ár og vóru illa viðfarnir. Teir vórði ikki leysir fyrr enn mánaðir eftir, at kríggjað var av.

Vit prátaðu nógv saman, og hann segði, at tað vóru bert fýra av yvirmonnunum sum yvirlivdu.

Myndugleikarnir í Grimsby vildu lýsa Olaf deyðan, tí einki var frætt frá honum so leingi, men hetta vildi mamman ikki góðkenna, og hann kom eisini umsíður aftur.

Olaf Olsen var ein av teimum mongu fólkunum, sum Harry og Hanna kendu, og tey komu saman í donsku sjómanskirkjuni í Hull, har Harry hevur verið nevndarlimur í mong ár.

## Harry: Verið við til minningarhaldini í Newcastle

Eg havi verið virkin í kirkjuni í 36 ár. Har var jú eisini ein føroyskur prestur, Hjørdis Kjærgaard. Hon hevur nú lagt frá sær, men vónandi kemur ein føroyskur prestur aftur.

Vit plaga eisini at fara til árligu minnisgudstænasturnar fyri danir og føroyingar, sum doyðu undir krígnum. Hesar eru í Newcastle á hvørjum ári fyrst í mai, umleið ársdagin fyri bardagalokið.
Her plaga eisini føroyingar at koma. FF-blaðið var við á hesum minningarhaldi í 2005 í samband við, at 60 ár vóru liðin síðan krígslok, og blaðið hevði drúgvar og áhugaverdar frásagnir haðani.

Tað var ein maður úr Danmark, sum kom hvørt ár til Newcastle. Hann hevði fingið eina medalju frá donsku drotningini, men hann vendi hana altíð øvugt. Hann visti ikki betur, og eingin hevði fortalt honum tað.

Vit kenna eisini væl Pat Jacobsen, sum var gift við Klæmint, beiggja rithøvundan Jørgen Frants Jacobsen, og tað hevur eisini verið frásøgn um tey bæði í FF-blaðnum. Klæmint sigldi sum maskinmeistari, og hann var eina ferð við at verða skotin niður av týskarum. Hann fekk eina medalju frá bretska konginum fyri sítt avrik í samband við hendan tilburð.

Pat arbeiddi á tí sokallaða poolinum, har hon ávísti sjómonnum kjansir. Tískil upplivdi hon ofta, at sjómenn, sum hon hevði ávíst hýru, gingu burtur og als ikki komu heim aftur. Hetta hevði hon mikið fortreð av.

## Arkitektur fyri býráðið í Hull

Aftaná, at vit vóru flutt av oynni Man komu vit so til Hull. Har var ikki so spennandi tá. Tað var framvegis nógv, sum ikki var bygt upp aftur eftir kríggið. Hetta var so seint sum í 1959. Tað var óhugnaligt at síggja. Hull var so sera illa bumbað undir krígnum. Hann var jú ein havnabýur og tí eitt mál hjá týskarum. Har doyðu ikki færri enn 1.200 fólk av krígsávum. Tað var ræðuligt at vera í Hull, serliga hjá kvinnum og børnum. Sjálvt danska kirkjan varð bumbað, men hon er síðan bygd upp aftur.

Eg fór at arbeiða hjá arkitektadeildini hjá býráðnum í Hull, sum er ein kendur býur hjá føroyskum fiskimonnum, har teir ofta hava landað fisk. Hetta var í ein tíð, tá ið Labour flokkurin hevði valdið í mongum býum, og flokkurin eisini vildi seta sín dám á býirnar. Labour var framburðssinnaður flokkur. Tí var eisini nógv bygt, eisini á tí sosiala økinum, sum skúlar, barnagarðar og ellisheim. Her var eisini framvegis nógv at byggja upp aftur eftir bumbingina undir krígnum.



*Havnarbasurin, har Hanna arbeiddi undir krígnum. Her var alt møguligt forkunnugt at fáa. Her síggja vit "nissurnar", Paula t.v. og Martina báðar sum vóru møðgur*



*Hetta er Káta Hornið við Havnarbasarinum*

## Louis arbeiddi fyri fíggjarmálaráðharran hjá Thatcher

Louis, okkara elsti sonur er føddur í 1949, og hann býr í London. Hann las búskaparfrøði har. Aftaná at vera farin úr skúlanum var hann ymsa staðni og kom eisini til Føroyar, har hann hevur arbeitt eina tíð. Hann var eisini til fiskiskap við línuskipinum Columbus, og hann minnist serliga skiparan Jákup Andreas Vang.

Einaferð veðrið var vánaligt, segði skiparin, at hetta var ikki lív fyri ein mann sum hann. "Tú skuldi heldur sitið á einum heitum universiteti í London." Louis sigur, at hetta hugsaði hann eisini um, tá ið hann seinni sat á einum universiteti.

Hann fór tíðliga frá við eftirløn 50 ára gamal, og hann fekk sera góðar treytir. Hann hevur arbeitt fyri fleiri stjórnir, og plagdi við hvørt at hava ørindi í House of Commons, undirhúsinum. Hansara arbeiði var at finna fram tilfar og tøl, sum skuldi nýtast í politiska arbeiðinum. Hann plagdi eisini at skriva røður fyri ráðharrar. Hetta var tó ikki eitt partapolitiskt starv. Louis hevur eisini fingið fleiri vøkur brøv frá Sir Geoffrey Howe, sum var konservativur fíggjarmálaráðharri, meðan Louis arbeiddi fyri hann. Howe var tann ráðharri, sum virkaði longst fyri Margareth Thatcher. Hann var eisini eitt skifti uttanríkisráðharri.

Nú arbeiðir Louis parttíð fyri SAS í stóru floghavnini í London Heathrow.

Vit kenna eisini Dánjal Rein, sum er sonur Marius Rein á løgtingsskrivstovuni. Hann arbeiðir eisini fyri SAS á skrivstovu teirra á flogvøllinum.

Louis dámar sera væl tað lív hann hevur nú. Hann ferðast javnan í Føroyum, og í heyst var hann eisini her til EM-undankappingina í fótbólti millum Føroyar og Frakland. Tað er óneyðugt at siga, hvørjum hann heldur við.

Kona Louis, Connie, sum er ættað úr Zimbabwe, var leiðandi sjúkrasystir á einum sjúkrahúsi á eini uppvakningardeild hjá sjúklingum, sum høvdu verið doyvdir. Hon hevði trupulleikar við rygginum, og hon legði tíðliga frá sær. Síðan keypti hon eina salong, og arbeiðir nú sum frisør.

Tá allur hesin ágangurin var ímóti føroysku hvalaveiðuni í Bretlandi var tað Louis, Helgi Joensen, ættaður í Gøtu, Marjun Joensen King, ættað úr Lorvík og Ólavur Rasmussen, sum tá var prestur í donsku kirkjuni, sum skipaðu fyri at fáa fram føroysku sjónarmiðini í Bretlandi.

Harry royndi eisini at hjálpa til við at hava lesarabrøv í bløðunum. Henda herferðin móti Føroyum man nú vera avhasað.

Okkara elsta dóttir eitir Nordina. Hon býr í Hessle, sum er nærindis okkum. Hon byrjaði at starvast í eini skrivstovu.